## Hitin oyðir fugl

Ein frágreiðing hjá BirdLife International kemur til ta niðurstøðu, at tann veksandi hitin á Jørðini er oyðandi fyri heimsins fuglasløg. Sagt verður, at meiri enn 1.220 fuglasløg eru í vanda fyri at doyggja út, og tað svarar til ein áttandapart av øllum fuglasløgunum í heiminum. Av hesum eru 190 sløg í veruligum vanda. BirdLife International sigur, at tað eru avleiðingar av tí veskandi hitanum so sum illveður og turkur, sum eru oyðandi fyri fuglin.



*Meiri enn 1.220 fuglasløg eru í vanda fyri at doyggja út*

*(Mynd: Vísir)*

# Bestu ferðamálini á sama korti

**Í hesum døgum verður eitt øðrvísi og stuttlig Føroyakort borið út í hvørt hús. Her finst eitt ótal av smáum tekningum, sum samstundis eru eitt yvirlit yvir bestu ferðamálini í ár**

FERÐAVINNA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Føroyakortið frá forlagnum »Føroya Met« verður borið út í hvørt hús, so øll kunnu seta seg at finna støðini, tey ætla at vitja í summar.

- Hetta kortið er eisini til tey, sum ikki duga at lesa enn!, sigur Ólavur Poulsen, sum hevur staðið fyri arbeiðinum at gera hetta kortið.

Á hesum kortinum eru smáar tekningar av tí forvitnisliga, sum er at síggja og uppliva í Føroyum. Her eru bátar og skip, kirkjur og søvn, kópur og hemari, alt teknað í einføldum og litríkum stíli. Janus Dam Guttesen hevur teknað.

Eisini eru upplýsingar um oyggja- og bygdaleiðir, kunningarstovur, sjálvtøkur og bensinstøðir við, so kortið er upplýsandi, vakurt og hent.




*- Vit hava tey ferðamálini við, sum savnaðu nógv fólk í fjør, og tey, sum fara at savna nógv fólk í ár, sigur Ólavur Poulsen, samskipari*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Einfalt og gott

Føroyakortið er gjørt við einum einføldum prinsippi í huga.

- Vit skulu hava tey ferðamálini við, sum savnaðu nógv fólk í fjør, og tey, sum fara at savna nógv fólk í ár, sigur Ólavur Poulsen.

Hann er sjálvur royndur maður innan ferðavinnu, og hevur við hepnari hond valt út veitarar og ferðamál, sum eru við á kortinum.

Framsíðan er eitt Føroyakort við einum hópi av smáum tekningum, meðan baksíðan á kortinum er býtt sundur millum teir seks landspartarnar, sum hava fingið hvør sítt yvirlit yvir »mástini« í økinum.

Teksturin á kortinum er á føroyskum, enskum og donskum. Kortið verður at finna á ferðaskrivstovum úti í heimi, hjá Smyril-Line og Atlantic Airways men eisini á kunningarstovum, hotellum, farstøðum og øðrum tænastustøðum í Føroyum.

Forlagið Føroya Met í Miðvági gevur kortið út, og grafisku sniðgevingini hevur Vasti í Klaksvík staðið fyri.

Ólavur Poulsen hevur savnað upplýsingar og samskipað, og Janus Dam Guttesen hevur teknað.

# Ein spurningur um røttu leiðina

Bláí Krossur
BLUE CROSS IN FAROE ISLANDS

**Hetta vikuskiftið fer Bláí Krossur Føroya at hava landsfund á Toftum. Evnið fyri fundin er Bláí Krossur í dag og framyvir. Í sambandi við landsfundin verður skipað fyri áhugaverdum tiltøkum, bæði fyri ung og eldri**

FELAGSSKAPUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Toftir:** Landsfundurin byrjar leygarmorgunin klokkan 10, og gjøgnum allan dagin eru spennandi tiltøk á skránni.

Nevnast kunnu millum annað eitt orðaskifti millum tingfólkini Eyðgunn Samuelsen og Bill Justinussen klokkan 11 um evnið »Hvørja ábyrgd hevur samfelagið til tess at tryggja børnum og ungum ein rúsfrían uppvøkstur?«

Klokkan 14 er ein pallborðsfundur og leygarkvøldið klokkan 21 er eitt ungdómstiltak á skránni, har evnið er »Ung og rúsur«.

Sunnudagin verður byrjað við gudstænastu klokkan 11 í Fríðrikskirkjuni, klokkan 14 er familjumøti og klokkan 18 er kvøldseta.

Landsfundurin verður hildin lutvíst í missiónshúsinum á Toftum og í Fríðrikskirkjuni.

### Rætta leiðin fram

Klokkan 16 leygardagin er aðalfundur. Skráin fyri aðalfundin er sambært viðtøkum felagssins og er tað millum annað frágreiðing frá arbeiðinum, framløga av roknskapi og val av landsnevndarlimum.

Til aðalfundin er landsnevndin í felagsskapinum komin við tveimum uppskotum – eitt um hækkan av limagjaldinum, og eitt um broytingar í viðtøkunum, soleiðis at vanlig mannagongd í dag samsvarar við viðtøkurnar.

Bláí Krossur er ein altjóða felagsskapur, ið hjálpir fólki við rúsdrekka og rúsevnis trupulleikum. Á landsfundinum kemur Heidi Westborg Steel, altjóða samskipari hjá Bláa Krossi í Noregi eisini at greiða frá.

Aðalskrivarin hjá Bláa Krossi, Hjalmar Hansen, sigur, at ætlanin við landsfundinum er, at blákrosslimir og onnur áhugað fáa møguleikan at skifta orð um arbeiðið.

Ynskið teirra er at hyggja eftir, hvørjar avbjóðingar liggja í tíðini og framtíðini, og hvussu felagsskapurin og limirnir kunnu møta hesum avbjóðingum.

- Ein og hvør felagsskapur hevur fyri neyðini at støðga á og spyrja seg sjálvan: ganga vit nú røttu leiðina? Eg eri serliga spentur uppá hvat kemur burtur úr pallborðsfundurin leygardagin hesin viðvíkjandi, sigur aðalskrivarin í felagsskapinum, Hjalmar Hansen.